# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Nøvn mangla

Færøernes Mellem- og Realskole



*Myndaeigari: Føroya Fornminnissavn*

Mynd í sambandi við framsýningin av millum- og realskúlanæmingum hjá Jórunn Dánjalsdóttir.

Framsýningin letur upp við kvøldsetu mánakvøldið 23. juli kl. 19, har borgarstjórin Heðin Mortensen setur framsýningina, og fyrrverandi næmingar fara at hugleiða um skúlatíðina. Framsýningin heldur fram til og við sunnudagin 5. august. Nærri verður lýst í ólavsøkublaðnum hjá Sosialinum, sum kemur í hvørt hús í landinum.

Myndin er tikin í skúlagarðinum í 1926 ella 1927 av gentum í tveimum flokkum. Vit kenna nøvnini á teimum flestu gentunum, men ikki á øllum:

Aftasta rað f.v.: Ebba (Ki) Jacobsen, Hanna Kamban (g. Ziska), Julianna Petersen (Diddan g. Nolsøe), Gunnhild Isholm (DK), Amanda Danielsen (g. Akraberg Hansen), Essemi Djurhuus (g. Jacobsen), Birthelena Egholm (g. Arge) og Turid Holm Jacobsen (g. Fuglø).

Næst aftasta rað: Oddvør Evensen, ókend, Tønny Egholm, ? Finsen, Mathilda Jacobsen (dóttir Gøtu Anthon) (DK), Helena Mørk (g. Hjelm), Ansa Christiansen (g. Djurhuus), ? Christiansen, g. Jacobsen (Essaba), ? (úr Vágum?), og Eva Samuelsen (g. Thomsen).

Næst fremsta rað: Karin Jacobsen, Helena Rubeksen (g. Michelsen), Maria Joensen (g. Restorff), ? (lærarinna), Annelin Joensen (g. Dal-Christiansen), Turid Waagstein (g. Rasmussen), Marianna Dahl og Karin Maria Dam (g. Åbek) (DK)

Fremsta rað f.v.: Aslaug Holm Jacobsen, Helena Dam, Helena Bærentsen, Olivia Rubeksen, Mia Trónd Hansen (g. Jensen), og Ebba Mohr (Ongland)

Um onkur kennist við genturnar, sum vit mangla nøvnini á, ella hevur okkurt at viðmerkja í hesum sambandi, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Jórunn Dánialsdóttir. Adressan er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn, tel. 316024 ella 226024.

†

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Svenningi Jacobsen**, ættaður úr Mykinesi, búsitandi í Havn, verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin klokkan 13.00

**Dagurin**
*13. juli. Margreta, deyð umleið ár 300. Var úr Antiokia, og foreldrini vóru heiðin.. Hon tók við kristnari trúgv. Av tí at hon ikki vildi lovast heidna herføraranum Ol*

# Sølutelt í Vágsbotni

Hósmorgunum varð eitt telt sett upp í Vágsbotni, á torginum har standmyndin av Nólsoyar Pálli er.

Tað eru tær báðar Drós í Ólavsstovu og Gudna á Rógvi Joensen, sum eiga og reka

D&G Souvenirs, sum hava sett teltið upp. Tær selja ymiskar lutir sum t.d. føroyskar troyggjur, bøkur, málningar, fløgur og aðrar gávulutir.

Hetta er eitt frítíðarítriv hjá okkum. Ætlanin er at seta teltið upp, tá veðrið er gott og nógv fólk eru í býnum, t.d. tá ferðamannaskipini vitja. Vit selja vørur frá føroyskum famleiðarum og listafólkum. Í hesum sambandi eftirlýsa vit vørur frá føroyskum listafólkum, sum eru vælkomin at seta seg í samband við okkum, siga Drós í Ólavsstovu og Gudna á Rógvi Joensen frá D&G Souvenirs.

**mg**

*Drós í Ólavsstovu og Gudna á Rógvi Joensen í søluteltinum í Vágsbotni*
*Myndir: Magnus Gunnarsson*



